# Latið kryvjivirkini sleppa at ar



**Nú norðhavsróðurin er byrjaður, skjýtir Mortan Johannesen upp, at útróðrarmenn sleppa at avreiða daggamla fiskin ókruvdan til okkurt av laksakryvjivirkjunum, sum einki hava at gera í hesum døgum, nú lítil og eingin føroyskur laksur er eftir at taka. Hann fýlist á, at daggamal útróðrarfiskur fær væl lægri prís á uppboðssøluni enn 7-10 dagar gamal fiskur. – Fiskivinnumyndugleikarnir eru nakrar nátthúgvur. Teir sita bara hendur í favn og gera einki, tí so hava teir einki skeivt gjørt – halda teir, sigur Mortan Johannesen**

ÚTRÓÐRARVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í nógv ár var Mortan Johannesen, Mortan hjá Andriasi í Hvannasundi, fiskimaður og kendur sum skipari. Seinni gjørdist hann alari og hevði virki í Kaldbak. Mortan hevur sum virkiseigari eisini fingist við onnur fiskasløg enn laks. Sum fiskaútflytari hevur hann eisini nomið sær kunnleika til útlendska marknaðin.

Seinastu árini hevur Mortan verið útróðrarmaður, og nú várfiskurin tekur seg móti landi norðanfyri, er hann millum teirra, sum liggja fram við. Onkur brúkiligur dagur hevur verið við snelluni, men enn hevur eingin rokfiskiskapur verið. Tað er tíðliga til árs, so enn er eingin orsøk til at missa mótið - og tað ger Mortan so avgjørt ikki, kenna vit hann rætt.

Tað er ikki honum líkt at missa mótið.

### Líkist púra ongum

Men Mortan hevur sína kontantu meining um útróðrarfiskin, sum hann heldur fer fyri alt ov lágan prís á uppboðssøluni í mun til fiskin, sum er 7-10 dagar gamal.

- Tað kann ikki vera rætt, at tú sum útróðrarmaður við daggomlum og væl hagreiddum fiski fært 2-3 krónur minni fyri veiðina enn eitt nú ein línubátur, sum kemur við 10 dagar gomlum fiski. Hetta líkist púrasta ongum, og tað er okkurt spinnandi galið, tá ið so er, heldur hann.

Aðrir útróðrarmenn eru fullkomiliga samdir við honum.

Men Mortan fýlist ikki bara at gongdini. Hann hevur eisini eitt uppskot um, hvussu komast kann burtur úr hesi vanlukku, at daggamal útróðrarfiskur soleiðis verður niður prioriteraður í mun til fleiri dagar gamlan fisk.

- Eg haldi, at tann besti og feskasti toskurin, sum útróðrarmenn avreiða av Norðhavinum, átti at farið fyri einar 30-40 krónur fyri kilo – ja, kanska enntá meira.

Mortan hevur eitt ítøkiligt uppskot um, hvussu hann heldur, at meira kann fáast fyri daggamla útróðrarfiskin, um rætt verður atborið.

### Ókruvdur til lands

Hann skjýtir upp, at norðhavsfiskurin verður førdur ókruvdur til lands og verður kruvdur inni á einum av kryvjivirkjunum, sum liggja still – ella hava minni at gera, nú lítil laksur er eftir at taka í Føroyum.

- Umborð á bátinum verður fiskurin blóðgaður í rennandi sjógvi og koyrdur í ísvatn. Síðan verður hann landaður til eitt av hesum virkjum, har hann verður kruvdur. Innvølurin - livur, rogn, magi og sil, sum telja eini 15% av vektini á fiskinum – verður selt, eins og fiskurin antin fer feskur av landinum – heilur ella sum fesk fløk ella verður virkaður til bestu og dýrastu vørur.

Mortan heldur, at hetta er ein møguleiki, sum í fyrsta lagi hevði givið daggamla fiskinum ein betri prís, eins og tey, sum eru vorðin arbeiðsleys á kryvjivirkinum – ella verða tað í næstum – framvegis kunnu hava nakað at fara upp til heldur enn at ganga arbeiðsleys. Haraftrat hevði alt, sum er uppi á fiskinum, komið til høldar í staðin fyri sum nú, at ein partur fer í havið aftur.

- Eg haldi avgjørt, at hetta hevði verið ein gongd leið til tess at komið burtur úr teirri vanlagnu, sum útróðrarfiskinum er fyri.

### Tvífaldur prísur

Mortan Johannesen heldur, at soleiðis, sum støðan er í dag, loysir tað seg slett ikki hjá útróðrarmonnum at hagreiða fiskin væl, tí tá ið útróðrarfiskurin liggur á fiskamarknaðinum, fer hann kortini fyri væl minni prís enn gamal fiskur, og tað er avgjørt ikki stimbrandi fyri hugin at hagreiða útróðrarfisk.

- Eg haldi, at vit soleiðis áttu at byrjað við várfiskinum av Norðhavinum nú beinanvegin, og eydnaðist royndin væl kryvja fiskin uppi á landi, kundi útróðrarfiskur sum heild verið kruvdur á kryvjivirkinum.

Mortan sigur, at útróðrarfiskurin antin kundi verið seldur púra feskur, sum fesk fløk ella virkaður til dýrar vørur.

Í sínum royndum sum laksaframleiðari og fiskaútflytari, vísir hann á, at niðurkøldur toskur er nógv lættari at hava við at gera enn laksur.

- Blanktoskur, sum hann eisini verður róptur, liggur høgt í prísi allastaðni, har tú kemur, men ikki í Føroyum. Tummilfingrareglan er, at feskur fiskur, sum ongantíð hevur verið frystur, hevur tvífalt so góðan prís, sum frystur fiskur hevur.

### Harður kappingarneyti

Mortan vísir á, at so skjótt, fiskur verður frystur, verð-